# Ávegis

**Ummælarin var tikin á bóli til listaframsýning í Smiðjuni við Lítluvík**

## Listaframsýning



**Kinna Poulsen**
post@sosialurin.fo



Í síðstu viku var ein av teimum mongu framsýningunum í Smiðjuni við Lítluvík, sum nevnast listaframsýningar, men sum sjálvdan hava tað stóra uppá seg listarliga sæð. Um hesa framsýningina kann tó sigast beinanvegin, at hon skaraði framúr og tók hendan ummælaran av bóli. Kvinnan, sum hetta stutta ummælið í høvuðsheitum snýr seg um, eitur Silja Strøm (f.1987). Vit hava upplivað hana áður eitt nú á Ólavsøkuframsýningini, men á hesari framsýningini hómast av álvara umhvarvið av eini veruligari listakvinnu. Hon framsýndi í Smiðjuni saman við mammu og systir síni; Gyðju Hjalmarsdóttir, sum sjálv nevnir seg fegnan amatør og Ingilín D. Strøm, sum við sínum 16 árum er rættiliga ung enn, men sum ivaleyst kann gerast heilt góð, fylgir hon somu leið sum systirin Silja, tí tað liggur eyðsýnliga væl fyri í hesari familjuni.

Silja fór í síðsta ár undir listarliga útbúgving á The Glasgow School of Art og vísti á framsýningini skúlaavrik innan ymisk tøkni, sum øll vóru merkt av framgongd og listarligari búning. Hon hevur m.a. arbeitt við eini portrettverkætlan, sum vit sóu á framsýningini í ekspressivum myndum, sum vóru málaðar við oljumáling á pappír. Harumframt sýndi hon fram prent og modeltekningar, umframt nakrar fínar tekningar, har hon sameinir eitt einfalt barnslig úttrykk við fløktum, setningum á ein originalan og áhugaverdan hátt. Hesar myndirnar, sum altso eru figurativar, ímynda oftast eitt barn, sum tekst við okkurt vanligt so sum at lesa, práta í telefon osfr. Á sama hátt sum í teknirøðum sæst hvat figurarnir siga í taliboblum og í hesum førinum tala teir svart við longum, fløktum setningum, ið snúgva seg um ymisk listasøgulig fyribrigdi. Skemtið vísir á tað absurda og sprettur av mótsetninginum millum tað spontana og ektaða, sum vit sambinda við barnið og sjálvshátíðarliga, intellektuella tokutalu, sum hoyrir teimum vaksnu til.





Enn eru trý ár eftir av útbúgvingini hjá Silju Strøm í Glasgow, ið seinnu árini er vorðið eitt satt listmekka fyri progressivu listini. Tað verður spennandi at síggja hvat Silja fær burturúr komandi árini. Men longu nú kunnu vit staðfesta, at hennara listagávur eru sjáldsama væl paraðar við skynsemi og áræði. Tí ivist eg onga løtu, at okkurt gott er í væntu.

